# 4 metur langt hol í Norrønu

**Norrøna bar við molan og sigldi tvær ferðir á Viðarnes, tá hon royndi at leggja á middegi í gjár, hósdagin. Hol er undir vatnganginum**

Á LAND
*Eirikur Lindenskov/*
*Jákup Mørk*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Nú meðan hesi orð verða skrivað vita vit, at vatn rennur inn í maskinrúmið á Norrønu, tí hol er undir vatnganginum. Fleiri bilar frá Sløkkiliðnum í Havn eru á staðnum. Vit síggja, at ein 20 metra long bugla er á bakborðsbógvi beint omanvert vatngangin og at eitt fýra metra langt hol er á bógnum.

Holið undir vantganginum er umleið miðskips í bakborðssíðu.

Vatn er komið inn í maskinrúmið, og Norrøna hevur tí ikki fulla maskinorku. Sleiparar royna at fáa skipið lagt at bryggjuni á Viðarnesi.

Ritan hevur tikið tey 25 ferðafólkini, sum við vóru og tey eru komin á land á Burstatanga í øllum góðum.

Vit á Sosialinum vóru eygnavitni til tilburðin. Vit sóu, at Norrøna kom skeiv inn um molan, og at hon stevndi móti Viðarnesi. Tað var týðuligt, at hon sigldi á, og at bakborðsbógvur tók. Síðani varð roynt at bakka, men tá tók bakborðssíða í grótkastið.

Ætlandi skuldi Norrøna hóskvøldið á promotionferð á nýggju leiðina millum Bergen og Hanstholm, men spurningurin er so, hvussu verður við hesum.






*Myndamaður okkara var sum vera man skjótur á staðnum, tá nýggja Norrøna sigldi seg inn á Viðarnes hósdagin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Hendan myndin er tikin í tí Norrøna sigldi á molan á Eystarubryggju…*
*Mynd: Jákup Sjatlá*



*…og her sæst skaðin. Hol er undir vatnganginum og vatn lak inn í maskinrúmið*
*Mynd: Jákup Sjatlá*



# Spennandi konsertir

**Komandi vikuskiftið verða tvær konsertir í sambandi við landsumfatandi innsavningina til frama fyri barnaheimið Nazaret og gøtubørn við herviligu sjúkuni HIV/AIDS í Cape Town í Suður-Afrika. Ein ørgrynna av luttakarum fara at luttaka á konsertunum**

TÍÐINDASKRIV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Nú er landsumfatandi innsavningin til frama fyri barnahjálpararbeiði í Cape Town í Suður Afrika av álvara komin í gongd, og fyriskipararnir, teir tríggir, Sámal Bláhamar, Hans Eiler Hammer og Steintór Rasmussen lata sera væl at undirtøkuni millum fólk.

– Vit hava savnað einar 30.000 krónur inn, sum nú er, sigur Hans Eiler Hammer, sum ikki ivast í, at konsertirnar báðar um vikuskiftið fara at eydnast væl.

Konsertirnar verða í Christianskirkjuni leygardagin 17. januar klokkan 17 og í Vesturkirkjuni sunnudagin 18. januar klokkan 16.

Talvan gongur til konsertinar, og allur innkomin peningur fer óskerdur til barnahjálpararbeiði í Cape Town.

Stuðul kann eisini latast á konto: 9865 – 102.743.8 í Norðoya Sparikassa, 9870 – 102.028.6 í Suðuroyar Sparikassa, 6460 – 167.023.2 í Føroya Banka ella á 9181 – 140.287.2 í Føroya Sparikassa.

Eftirlit og grannskoðan við innsavningini hevur Grannskoðaravirkið Rasmussen & Weihe.



*Ein av best umtóktu bólkunum í Føroyum í løtuni munnu vera I Am, og teir eru eisini millum luttakararnar í konsertini*

## Luttakararnir á konsertini eru:

Magni Christiansen
Terji Vestergaard, klaver
Kai Otto Frederiksberg, bass
Leif Høj, trummur
Peter Hermanesen, steelgittar
Daniel Nielsen, violin
Eyðun Jacobsen, kassagittar & sang
Vivi Hammer, kór
Elin Madsen, kór
Magni Christiansen, sang

I AM
Heðin Askham Olsen, sang
Eyðbjørn Jacobsen, sang
Arni Zachariassen, gittar
Hans Ove Johannesen, trummur
Alvin E. Andersen, tangentar
Gestasangari: Brandur Enni

Brandur Enni
Torkil Mørkøre, tangentar
Brandur Enni, sang

Torkil Mørkøre & vinmenn
Kristoffur Mørkøre, bass
Beddi Hansen, gittar & mandolin
Pætur á Borg, akk. gittar
Høgni Klakstein, trummur
Mikkjal Hvannastein, el gittar
Leivur Vitalis, el gittar
Torkil Mørkøre, sang & tangentar

MC Restorff
Eyðun Jacobsen, strúkarar
MC Restorff, klaver og sang

Systrarnar Rannvá & Arnfríð Lützen

Systrarnar Barbara, Vanja og Laila

Kristel og Jens Lisberg
Ólavur Øster, gittar
Jens Lisberg, sang
Kristel Lisberg, sang


